## Holst var sjúkur

Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst var ikki við frá byrjan, tá ið Lyngby spældi ímóti Brøndby í donsku superliguni í gjár. Orsøki var, at Holst hevði ligið sjúkur í vikuni, og orkan var ikki til ein heilan dyst. Holst kom tó á vøllin í seinna hálvleiki, men hann fekk einki broytt – Lyngby tapti 3-0. Lyngby liggur aftast í superliguni við 9 stigum fyri 12 dystir. Beint frammanfyri liggja Viborg og AGF.



## Ferguson var illur

Sir Alex Ferguson var úti við rívuni eftir stórdystin millum Arsenal og Manchester United. - Howard Webb er ein góður dómari. Men tað vóru løtur í dystinum, har hann favoriseraði Arsenal. Til dømis við støðuna har Arsenal javnar til 2-2. Teir gera upplagt fríspark ímóti Saha beint áðrenn málmøguleikin uppstendur, segði Ferguson eftir dystin. Ferguson heldur eisini, at trygdin hjá honum, og hinum á United-beinkinum ikki var nóg góð. Hann heldur eisini, at væl uppbakkandi áskoðarnir hjá Arsenal løgdu eitt stórt trýst á dómaran. Arsenal vísir aftur, at trygdin ikki var nóg góð.

## Levi til EB/Streym

**Levi Hanssen spælir komandi ár við EB/Streymi, har nýggjur høvuðsstuðul varð kunngjørdur á ársveitsluni**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Seinasti fótbóltsdysturin í hesum kappingarárinum er spældur, men í EB/Streymi var talan um eitt hendingaríkt vikuskiftið, hóast bóltsurin ikki rullaði.

Leygarkvøldið varð skipað fyri ársveitslu í ítróttarhøllini í Kollafirði, og har varð kunngjørt, at felagið hevur fingið nýggjan høvuðsstuðul. Búmerkið hjá Føroya Banka kemur komandi kappingarár at prýða leikbúnarnar hjá felagsliðnum, sum í ár hevur havt sítt besta kappingarár nakrantíð, har teir vunnu steypakappingina og endaðu nummar tvey í landskappingini.

Harnæst boðar felagið umvegis heimasíðu sína í kvøld frá, at tey eisini hava knýtt ein leikara aftrat hópinum frá komandi kappingarári at rokna. Levi Hanssen, sum er uppvaksin í B36, men tey bæði síðstu árini hevur spælt við Skála, skal nú umboða EB/Streym.

# ÍF og SÍ fremst

**Heimasigrar í báðum dystunum í bestu mansdeildini hava við sær, at ÍF og SÍ nú eru fremstu liðini í deildini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tey bæði síðvandu Fleyr og Mjølnir eru á aftastu sessunum í meistaradeildini hjá monnum í flogbólti. Tað er støðan eftir fyrstu fáu dystirnar á árinum, og hvørgin parturin megnaði av álvara at sannføra um, at tað eigur at vera øðrvísi enn tað sama.

Á Kambsdali var Fleyr á vitjan, og her var fyri tað nógva talan um einvegis ferðslu. Meistararnir úr ÍF vóru greitt omaná, og tó at Fleyr royndi at svara aftur eina løtu, so gav hetta ikki stórvegis. Tvørtur ímóti setti ÍF av álvara trumf á, tá Fleyr hevði tikið triðja settið, og við tryggum 25-16 í fjórða settinum undirstrikaði ÍF, at teir vóru sterkara liðið.

Í Sørvág beit Mjølnir eitt sindur meira frá sær. Eftir at gestirnir javnaðu til 1-1 eftir næsta settið, tóktist spenningur veruliga at koma í dystin, men vertirnir vildu tað tó øðrvísi. Triðja og fjórða settið var als eingin ivi, og so kundu teir leggja seg ájavnt við ÍF í oddinum.

Fram, sum hevði frí hetta vikuskiftið, tykist enn hava hug at stinga nøsina fram millum tey bæði oddaliðini. Mikukvøldið skulu teir á heimavølli royna seg móti SÍ í tí, sum líkist eisini veruligari styrkisroynd.



*Fleyr fekk ikki gjørt stórvegis, tá teir vitjaðu hjá ÍF leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Úrslit

**Meistaradeild kvinnur**

| | |
|---|---|
| Fleyr-Dráttur | 0-3 (15-25, 12-25, 9-25) |
| TB-ÍF | 1-3 (25-20, 24-26, 23-25, 16-25) |
| Mjølnir-KÍF | 2-3 (23-25, 26-24, 18-25, 25-23, 4-15) |

**Meistaradeild menn**

| | |
|---|---|
| ÍF-Fleyr | 3-1 (25-19, 25-22, 19-25, 25-16) |
| SÍ-Mjølnir | 3-1 (20-25, 25-17, 25-16, 25-16) |

# Trý renna kapp í oddinum

**ÍF er enn ósigrað, men bæði Dráttur og ÍF royna at halda fast í oddinum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast bert fá umfør eru farin av meistaradeildini hjá kvinnum, so tykist stigatalvan longu nú verða farin í tvey.

Tey trý niðastu vóru øll í dysti um vikuskiftið, og tó at Mjølnir-kvinnurnar vóru heilt nær sínum fyrsta stig, so vildi ikki bera til kortini.

Mjølnir hevði vitjan av KÍF, sum noyddist út í drúgvan 5-settara, men tað rakk tó ikki til stig hjá heimaliðnum. Talan varð um ein sera javnan dyst, har tað fleiri ferðir reið um snarið. Seinasta settið settu gestirnir tó av álvara ferð á. Kreftirnir og konsentratiónin hjá Mjølni gingu eisini undan, og við tryggum 15-4 kundu tær úr Kollafirði toga sigurin heim..

Á tvøroyri tók tað eina løtu, áðrenn ÍF veruliga kom fyri seg. Heimaliðið birti sær eina vón við at vinna fyrsta settið, og vildi væl til, so kundi talan væl verði um stig eisini. Gestirnir eru tó ikki oddalið fyri einki, og við sjálvsálitinum, sum hetta gevur, megnaðu tær tvær ferðir á rað at vinna sera tøtt sett við teimum báðum neyðugu bóltunum. Og so var at kalla útselt hjá TB, sum ikki megnaði at halda ferðini í dystinum koyrandi.

Seinasti dysturin var í Havn, har Dráttur vitjaði hjá Fleyr. Her gjørdist talan um tryggan sigur til Drátt. Samanlagt vann Fleyr bara 36 bóltar, og tí kundu tær illa mótmæla greiða tapinum.